# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## ÆVISØGA UM ELIZABETH DROTNING

Bretska drotningamamman, Queen Elizabeth, hevur nú fingið sína almenni ævisøgu í bók. Tað er rithøvundin William Shawcross, sum hevur skrivað bókina, og ummælini eru framúr góð. Mail On Sunday skrivar, at vanliga hevði drotningamamman sínar tankar fyri seg sjálva, men í hesari bókini verður tað broytt. Country Life skrivar, at hendan ævisøgan er eitt meistaraverk, og eingin orsøk er at skriva nakra aðra bók um drotningamammuna.

**WILLIAM SHAWCROSS**
The Queen Mother
Knopf




## VIÐ RYGGINUM MÓTI MÚRINUM

Arsenal og serliga Liverpool hava fingið misjøvn úrslit í ensku landskappingini seinastu vikurnar. Sunnudagin bresta liðini saman á Anfield Road í Liverpool, og hetta er ein sera týðandi dystur fyri feløgini, sum stríðast fyri at verða millum tey fremstu í deildini. Vanliga eru Arsenal og Liverpool millum fýra tey fremstu, men nú bjóða feløg sum Manchester City, Tottenham og Aston Villa.

**LIVERPOOL-ARSENAL**
Premier League
Sunnudagin 13/12 kl. 17.00



## STÓRT JÓLASHOW

Um eina viku verður stóra jólashowið við Thomas Eje, Lene Siel og Blake í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Showið er samansett við undirhaldi frá Thomas Eje og sangi frá Lene Siel og Blake. Thomas Eje og Lene Siel eru kend donsk listafól, meðan sangbólkurin Blake er úr Onglandi – klassiskt boyband hevur onkur rópt teir.

**JÓLASHOW**
Ítróttarhøllin á Hálsi
Fríggjakvøldið 18/12 kl. 20.00

## ØÐRVÍSI SØGUBÓK UM SKOTLAND

Søgan um Skotland er merkt av nógvum hendingum, har skotar hava verið fyri órætti, miseydnu og tapi. Men Neil Oliver roynir í hesari bókini at finna fram til, um tað veruliga er so við skotsku søguni, og hann kemur við nógvum øðrvísi og spennandi søgu. Bókin byggir á einar BBC-røð um Skotland.

**NEIL OLIVER**
A History Of Scotland
Weidenfeld &
Nicolson





## FITTUR KJAKFILMUR

Filmurin The Challange snýr seg um ein kjakbólk við myrkum børnum í USA í 30'unum. Lærarin Melvin Tolson, sum verður spældur av Denzel Washington, gongur høgt upp í at venja kjakbólkin, og tey luttaka í kappingum, sum teir klára seg sera væl í. Og tað endar við einari stórari uppgerð ímóti kenda Harvard skúlanum, sum tey myrku børnini av Wiley College skulu takast kampin upp við.

**THE CHALLANGE – THE GREAT DEBATERS**
dvd-filmur



## VÁGAKÓRIÐ HEVUR JÓLAKONSERTIR

Vágakórið fer at seta sín dám á jólahaldið í Vágum. Kórið hevur fýra jólakonsertir í bygdunum í Vágum, og tann seinasta av teimum verður í kirkjuni í Sørvági mánakvøldið.

**VÁGAKÓRIÐ**
Jólakonsert í Sørvágs kirkju
Sunnudagin 11/12 kl. 20.00



## JÓGVAN OG FRÍÐRIK ÓMAR VITJA TUTL

Best seljandi fløgan í Íslandi seinastu vikurnar hevur verið útgávan Vinaløg, sum føroyski Jógvan Hansen og íslendski Fríðrik Ómar hava gjørt í felag. Fløgan hevur eisini selt væl í Føroyum, og í næstu viku koma teir báðir til Føroya at vitja. Teir fara millum annað at signera fløguna í Tutl handlinum í Havn.

**JÓGVAN & FRÍÐRIK ÓMAR**
Tutl á Káta Horninum í Havn
Hósdagin 17/12 kl. 16.30